# Prísirnir á bensini og olju enn á veg uppeftir

*Í løtuni eru bæði prísirnir á olju og bensini methøgir í Føroyum, men metingarnar siga, at teir fara enn longur upp*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er onki nýtt, at føroyingar hava ilskast, hvørja ferð, teir eru farnir á eina støð at fylla sær tangan.

Men nú ber av, tí so vítt, vit hava fingið uppspurt, hevur hvørki bensinið, ella dieseloljan nakrantíð kostað meiri enn tey gera í løtuni.

Í løtuni kostar ein litur av blýfríum bensini hjá Shell 8,73 krónur og kaliumbensinið kostar 8,86 krónur fyri liturin.

Og tey eru mong, sum meta, at prísirnir fara enn longur upp.

Stjórin á Shell í Føroyum, Hákun Djurhuus, sigur, at teir eru ikki so fegnir um at spáa ov nógv um framtíðina.

Men hóast Hákun Djurhuus ikki ger so nógv av at meta um framtíðina, so sigur hann gongdin í Føroyum fylgir gongdini aðrastaðni, tí hetta er ikki ein sjálvstøðugur marknaður.




*Tað eru fleiri samanfallandi orsøkir til, at prísirnir á olju og bensini eru so høgir nú. Hevði løgtingið ikki broytt oljuavgjaldið herfyri, hevði oljan verið umleið 10 oyru bíligari*

Men eftir spádómum úr øðrum norðurlondum, er fryktandi fyri, at prísirnir fara enn longur upp og teir kunnu fara heilt upp um níggju krónur fyri liturin.

Seinast bensinið fór upp, var 18. mai, tá ið tað dýrkaði 10 oyru liturin.

### Tvær krónur í trý ár

Sostatt kann staðfestast, at bensinprísirnir eru nógv hækkaðir seinasti árini. Tilsamans eru prísirnir hækkaðir einar tvær krónur hesi seinastu trý árini.

Tá ið blýfría bensinið var dýrast í 1997, kostaði tað 7,96 krónur, í 1998 kostaði tað 7,64 og í fjør kostaði tað 8,11 krónur.

### Sama gongdin

Sama gongdin hevur verið í dieseloljuni, tí nú kostar hon 4,50 fyri liturin úr tanganum, og hetta er tað mesta, hon nakrantíð hevur kostað.

Seinast dieseloljan hækkaði, var eisini 18. mai, tá ið hon dýrkaði 4 oyru liturin.

### Oljan 10 oyru ov dýr

Tað eru ikki bara bileigarar, sum merkja sviðan av hækkandi olju- og bensinprísum, tað gera húsarhaldini so sanniliga eisini.

í Løtuni kostar ein litur at húsarhaldsolju frá Shell 3,60 krónur fyri liturin.

Tá ið hon ksotaði mest í fjør, kostaði hon 3,31 krónur fyri liturin og í 1998 kostaði hon 2,97, tá ið hon var dýrast.

Men 1998 var eisini árið, tá ið oljuprísirnir botnaðu, og tá ið hann var lægstur í 1998, kostaði húsarhaldsoljan 2,56 krónur fyri liturin.

Herfyri samtykti Løgtingið at leggja oljuavgjaldið fast á 80 oyru fyri liturin og tað hevur sína ávirkan á prísin.

Hevði gamla skipanin verið galdandi, hevði prísurin á húsarhaldsolju verið umleið 10 oyru bíligari fyri liturin enn hann er.

Fyrr var oljuavgaldið nevniliga ásett alt eftir, hvussu nógv oljufeløgini keyptu oljuna fyri, og jú hægri prísurin var, jú lægri varð avgjaldið.

### Samanfallandi orsøkir

Hákun Djurhuus sigur, at tað eru fleiri samanfallandi orsøkir til, at oljuprísirnir eru blivnir so høgir.

–Í høvuðsheitum er talan um útboð og eftirspurning, so tá ið minni er til, dýrkar oljan.

Hinvegin hevur dollarin bara gingið uppeftir og uppeftir og tað ávirkar eisini prísin, tí olja verður keypt í dollarum. Og harafturat økist nýtslan av bensinið um summari, so tað er ikki óvanligt, at prísurin fer upp um summarið.

# 100 nýggj ansingarpláss til børn klár í Havn um eitt ár

*– Tey fyrstu 40 dagrøktarplássini verða klár í oktober mánaða í ár og næsta summar verða 60 pláss tøk afturat*

ÁKI BERTHOLDSEN

Um eitt gott ár verða nýggj ansingarpláss til 100 børn afturat tøk í Havnini.

Og tey verða á trimum dagstovnum, sum standa í hvør sínum enda í býnum.

Elin Lindenskov, forkvinna í Sosialu nevnd hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at talan er um at byggja ein nýggjan stovn.

Men harafturat verða tveir stovnar afturat bygdir út.

Tann nýggi stovnurin, sum skal byggjast, verður bygdur í Vesturbýnum, úti á Landavegnum niðanfyri skrivstovuna hjá SEV er.

Staðarnavnið er Á Fløtum, siga tey.

Arbeiðið at fyrireika bygginginga eru komnar rættiliga væl áleiðis og arbeiðið verður boðið út í næstum.´



*Býráðið hevur sett sær fyri, at í 2006 skuldi tørvurin á barnansing í Havn verið nøktaður. Men so má ferðin setast munandi upp, sigur Elin Lindenskov, forkvinna í sosialu nevnd*

Ætlanin er so at fara undir sjálva byggingina heilt skjótt, so at stovnurin verður liðugur og klárur at taka í nýtslu næsta summar.

–Hetta er ein stovnur til 60 børn, sum í høvuðsheitum verður barnagarður.

Tað verða tríggjar stovur í hesum barnagarðinum við 20 børnum á hvørjari stovu.

Men ein av hesum stovunum veðrur kortini ein smábarnastova til tvey og trý ára gomul børn, so talan verður um 40 barnagarðspláss og 20 smábarnapláss á hesum stovninum.

Afturat hesum barnagarðinum, verða tvey býlingshús eisini bygt út, so at pláss verður fyri 20 børnum afturat á hvørjum.

Talan er um býlingshúsið Millum Gilja og á Ternuryggi og tey verða liðug seinni í ár, helst í oktober, sigur Býráðið.

### Lættir trýstið

Hesi 100 plássini, sum koma afturat, fara at lætta trýstið á dagrøktarøkinum eitt sindur.

Men Elin Lindenskov ásannar, at hetta er verri enn so nóg mikið til at nøkta tørvin, tí bíðilistarnir verða bara longri og longri og nú eru næstan 400 børn á bíðilista at fáa dagrøktarpláss í Havn.

Elin Lindenskov sigur, at fólkavøksturin í Havnini hevur verið nógv størri enn nakar hevði roknað við.

– Tí er tað greitt, at tann málsetningur, býráðið hevur sett sær á dagrøktarøkinum má endurskoðast, tí hann fer als ikki at nøkta tørvin.

Hon sigur, at í 1996 setti býráðið sær fyri at nøkta tørvin á barnaansingarplássum við at útvega 30 pláss um árið í 10 ár, tí so skuldi tørvurin verið nøktaður í 2006.

–Men gongdin higartil hevur víst, at hesin málsetningur má endurskoðast, so at meiri ferð kemur á arbeiðið. Tí hóast vit hava útvegað væk meiri enn tety 30 plássini um árið síðani 1996, halda vit ikki tørn, tí bíðilistarnir verða bara lngri og longri. Sostatt má býráðið endurskoðað ætlanina so at hetta økið verður raðfest hægri, sigur Elin Lindenskov.

Sjálv heldur hon, at tann næsti stovnurin, sum skal byggjast, má byggjast á Argjum.



# PopTop í Grasagarði

*Leygardagin klokkan 16 fer toppurin av ungum popparum at kappast í Grasagarði í Havn*

DAGFINN OLSEN

Síðani 1988 hevur verið skipað fyri Pop Top konsertum. Hetta er forum, har ungir tónleikarar sleppa at royna seg og kappast.

Leygardagin klokkan 16 fara 5 ungir bólkar á pall í Grasagarði í Havn. Bólkarnir hava vant í vetur í Skansastovu, Margarinfabrikkini og í Studentaskúlanum. Eins og undanfarin ár, verður konsertin hildin í samstarvi við Mjólkavirki Búnaðarmanna.

Á konsertini verður høvi at hoyra fjølbroyttan tónleik. Umframt øll sløg av tónleiki, leika bólkarnir eisini heimagjørt tilfar.

Óivað verður trupult at finna vinnaran í ár, tí bólkarnir eru javnt góðir, sigst. Men tað er áskoðarafjøldin, ið skal døma. Síðsta tíman av konsertini sleppa lurtarar at atkvøða. Í fjør atkvøddu meira enn 300 lurtarar, so tað ræður um at atkvøða fyri sínum yndisbólki.

### Vinnarar á ólavsøku

Vinnararnir av Pop Top konsertini sleppa at spæla á ólavsøkukonsertini. Umframt fáa teir T-troyggjur frá MBM. Allir luttakarar fáa eitt karton av Pop Top at sløkkja tostan við, eftir pallframførslurnar.

Síðan byrjan hava ikki so fá luttikið á Pop Top konsertunum og fleiri hava verið at sæð og hoyrt seinni. Eitt av nøvnunum er t.d. Mark No Limits

### Úr skránni

AIRBACKS (Skansastova) Uni R. Debess, guitar & sang, Jóanes Reinert, trummur, Jógvan á Mýrini. El.bass & sang, Herfinn Árnafjall, klaver & sang.

SALUTE (Skansastova) Høgni Fagraberg guitar & kór,Hans-Edward Andreasen, sang, Ísak Sambleben, el.bass, Rúni K. Mouritsen, trummur.

Salute hevur verið til í 8 ár og teir í bólkinum hava broytt oftani musikskíl. Nú hava teir blandaðan musikstíl. Teir siga sjálvir, at teir hava ongatíð verði so goður sum nú í ár.

Program, alt heimagjørt (ca. 20-30 min)

1 My Inspiration
2 End of Days
3 What tke Hell
4 Mother
5 Mr. Pshyco
6 Battlefield part 3

E-POT (Studentaskúlin í Hoydølum) Petur Olsen, el. bass, Heri Trondusen, rødd Jógvan Rasmussen, guitar og rødd., Hans Erling Guttesen, trummur
Bárður Justinussen, guitar.

Teir spæla ymiskan tónleik, bæði villan og stillan – teir spæla alt frá cafétónleiki til harðan rocktónleik – teir spæla ofta til konsert og næstan bara egnan tónleik – teir have spælt saman í 6 mánaðir – teir vera við í studentaskúla-fløguni »ROCK ALL«

PÁLL FINNUR PÁLL (Studentaskúlin í Hoydølum)
Páll Hammer, klaver
Finnur Jensen, rødd
Páll Oddur Rubeksen, guitar og rødd

Bólkurin eitur so, tí at teir sumeru við í Bólkinum eita Páll, Finnur og Páll. Bólkurin byrjaðu fyri einum mánað síðani og eru so at siga nýggir innanfyri tónleikaheimin. Tónleikastílurin er sera friðaligur. Tað er bara klaver, guitar og røddir og teir syngja bara á føroyskum.

KRIT
Edmund í Garði.



*Frá PopTop konsertini í fjør í Grasagarði*

# Gunnhild og várrøddir

*Leygarkvøldið fer Gunnhild Andreasen á pall á Meiarínum í Havn, saman við øðrum kendum røddum*

DAGFINN OLSEN

Undir heitinum Várrøddir, verður leygarkvøldið skipað fyri sonevndum musical evening ,a Meiarínum.

Og umframt at vera várrøddir, so eru tað kendar røddir, ið mynda kvøldið. Gunnhild Andreasen telist millum royndastu og vakrastu røddir, ið vit eiga í Føroyum. Hon hevur síðani á heilt ungum árum verið við í kórhøpi. Hon tekur sangin í álvara og roynir at menna seg innan hesa grein. Hon hevur m.a. verið á skeiði í Danmark fyri stuttum.

Men umframt kórsang, so hevur Gunnhild eisini roynt seg innan aðrar greinar av sangi og sungið solo. Á skránni leygarkvøldið er breitt úrval av tí, hon hevur fingist við seinastu mongu árini.

Gestasangarar leygarkvøldið eru Eivør Pálsdóttir og Malan Eyðunsdóttir, sum kemur á marknaðin við solofløgu um stutta tíð.

Tónleikarar verða Stamen Stantchev, Edvard Nyholm Debess og Herluf Lützen. Gesatónleikari er Karsten Vogel.

Atgongumerki fáast í Kunningarstovuni í Havn og við dyrnar og tey kosta 100 krónur. Tiltakið Várrøddir byrjar klokan 22 leygarkvøldið.



*Gunnhild Andreasen er, hóast ung, millum royndastu kórsangarar, men hevur eisini roynt seg á øðrum økjum innan sang*

FØROYA LANDSSTÝRI

## Søkt verður eftir fólki til Vinnumálastýrið

### 2 projektfulltrúar til ES-verkætlan

**Uppgávur:**

Høvuðsuppgávurnar verða at laga føroyska lóggávu á veterinera og heilsufrøðiliga økinum til ES reglur.

**Krøv:**

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv ella líknandi útbúgving.
Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til edv.
Fólk, sum eru um at vera liðug við útbúgving sína, eru vælkomin at søkja.

**Setanartreytir:**

Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingarfelagið.
Setanarskeiðið eru tíðaravmarkað til 31. desember 2000, tó so at talan kann verða um fast starv eftir hetta.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsóknir:**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 9. juni 2000.
Størvini verða sett skjótast tilber.

### Skrivari

***Vegna barnsburð verður søkt eftir skrivstovufólki til Vinnumálastýrið.***

**Uppgávur:**

- Journal og postavgreiðsla
- Ymisk møalsavgreiðsla
- Aðrar fyrifallandi skrivstovuuppgávur

**Krøv:**

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi førleika.
Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt. Kunnleika til EDV á brúkarastøði og góð samstarvsevni.

**Setanartreytir:**

Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og starvsmannafelagið.

**Umsóknir:**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 16. juni 2000.
Starvið verður sett uml. hálvan juli ella fyrst í august og 6 mánaðir fram.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Vinnumálastýrið
Postboks 377
FO-110 Tórshavn

Vilt tú hava meira at vita um størvini, kanst tú ringja til Bjarna Askham Bjarnason, deildarstjóra, tel 35 60 60.

V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð

team 85 • 31 65 11